

## Nógv ung missa arbeiðið

Tøl hjá íslendsku hagstovuni vísa, at lutfalsliga nógv ungfólk missa arbeiðið. Hetta hevur havt við sær, at í dag er arbeiðsloysið millum tey 16 til 24 ára gomlu komið heilt upp á 23 prosent. Tey arbeiðsleysu í hesum aldursbólkinum eru umleið 2.000 í tali ella umleið 600 fleiri enn í november, og av teimum búgva umleið 700 í Reykjavík. Á hagstovuni vænta tey, at talið á arbeiðsleysum ungfólki fer at veksa teir næstu mánaðirnar, og tey mæla fakfeløgum og øðrum til at skipa fyri skeiðum fyri tey arbeiðsleysu ungfólkini.

# Matvøruvinna als ikki ringasta útgangsstøði

**Fiskivinna er nógv betur enn eitt nú KT, tá ið kreppan herjar, tí mat hava vit altíð tørv á, ljóðar tað frá Stine Bosse, samtaksstjóra í TrygVestagingar-fyritøkuni TrygVesta. Hon er høvuðsrøðari á Ársins Leiðaradegi, og gleðir seg nógv til at vitja Føroyar**

RØÐARI
*Edmund Jacobsen*
*edmund@pressecentrum.dk*

Ein lítil búskapur sum tann føroyski við einari dominerandi høvuðsvinnu, fer altíð at verða viðbrekin. Men føroyingar skulu hinvegin verða fegnir um, at tað er fiskivinnan, sum er høvuðsvinnan, og ikki eitt nú KT sum í smáu baltisku londunum. Soleiðis ljóða boðini frá Stine Bosse, samtaksstjóri í donsku tryggingarfyritøkuni Tryg Vesta, sum verður høvuðsrøðari á Ársins Leiðaradegi í Havn fríggjadagin 23. januar.

- Lat tað verða sagt beinanvegin: Eg eri á ongan hátt serfrøðingur í føroyskum viðurskiftum, men eg havi eina meining um tykkum hóast alt. Og hon er, at ein vinna sum fiskivinnan fer altíð at skapa møguleikar fyri tykkum. Um føroyingar høvdu KT sum høvuðsvinnu, so høvdu tit uttan iva upplivað fíggjarkreppuna nógv ógvusligari. Játtanir til KT eru ofta millum tað fyrsta, ið verður skert burtur í krepputíðum. Undir slíkum umstøðum er tað lutfalsliga gott at hava matvørur sum høvuðsvinnu, tí líkamikið hvussu ógvuslig kreppan gerst, so verður altíð eftirspurningur eftir mati. So tykkara útgangsstøði er slettis ikki so býtt, sigur Stine Bosse til Sosialin.

### Ein máttmikil kvinna

Stine Bosse er uttan samanbering tann mest máttmikla kvinnan í danska vinnulívinum. Sum stjóri á TrygVesta er hon uttan íhald í ljósmála, og hon smæðist ikki burtur í hesum leikluti. Umframt at verða høgt í metum sum stjóri, er hon ein íðin og dugnaligur fyrilestrahaldari, og ferðast kring alt Danmark við sínum boðskapi. Og beint nú er tað fíggjarkreppan - og hvussu fyritøkur sum best sleppa undan ringastu árinunum - sum stendur ovast á hennara dagsskrá:

- Ikki tí. Mín forsøgn um fíggjarkreppuna er als ikki bjartskygd. Eg meti, at einasti vegurin burturúr kreppuni er, at amerikanar av álvara broyta kós. Har skulu stórar ábøtur til í USA. Kapitalinnspræningin uppá 800 milliardir dollarar frá amerikanska statinum er ein góð byrjan, men amerikanar skulu í holt við mundandi meira uppsparing, og so skal skattatrýstið hjá teimum setast upp, sigur Stine Bosse.

- Um tað eydnast Barack Obama at fáa undirtøku til sínar búskaparligu ábøtur, so vænti eg, at amerikanski búskapurin so smátt fer at koma fyri seg áðrenn ársenda 2009. Men hvussu long og álvarslig kreppan gerst veldst eisini um sinnalag - svartskygni kann bara elva til eina enn størri kreppu. Tí hevði tað verði jaligt, um vit upplivdu framgongd móti ársenda, sum fleiri búskaparfrøðingar hava spátt. Men bæði 2009 og 2010 verða uttan iva torfør ár fyri bæði vinnulív og vanlig fólk, sigur Stine Bosse.

### Innovatón hevur týdning

Stine Bosse leggur eisini dent á, at tað er alneyðugt hjá fyritøkum at verða nýskapandi og innovativar í krepputíðum:

- Menning og nýskapan eru umráði, ið ofta verða skerd burtur í krepputíðum. Men hóast tað kann tykjasta neyðugt at skerja her, so er tað eitt mistak. Vit hava upplivað fer eftir fer, at tær fyritøkur, sum fokusera á innovatión í krepputíðum, koma sterkari undan kavi, tá ið framgongd aftur verður í búskapinum. Henda boðskap royni eg at fáa fram hvørja ferð eg haldi fyrilestur, sigur Stine Bosse.

Hennara egna vinna - tryggingarvinnan - er eisini í holt við at tillaga seg til árinini frá fíggjarkreppuni. Og hennara boðskapur til tryggingarfyritøkur er einfaldur:

- Seti prísirnar rætt! Tryggingarvinnan hevur ein óvana, sum er, at bara vit fáa tryggingargjøldini inn, so snýr tað seg bert um at fremja røttu íløgurnar við hesum inntøkum. Hesin hugsunarháttur er deyður! Fíggjarkreppan hevur tikið lívið av hesum hugburðið. Nú skulu tryggingarfyritøkur beinleiðis vinna pening burturúr tryggingargjøldunum, tí tað er torførari enn nakrantíð at fremja íløgur. Tí er tað so neyðugt, at príslegan innan trygging er røtt, sigur Stine Bosse.

Hon leggur afturat, TrygVesta fyri tveimum mánaðum síðani avgjørdi at halda aftur við at seta fleiri fólk í starv, og á henda hátt royna at sleppa undan at siga fólk úr starvi.

### Gleðir seg til føroyatúrin

Stine Bosse hevur ongantíð áður verði í Føroyum, men hóast tað veit hon nakað um føroyingar og Føroyar:

- Besta vinkona mín, sum eg havi kent síðani eg var smágenta, hevði føroyska mammu. So tey høvdu skerpikjøt hangandi í garasjuni, og mamman bant skóleistar. So eitt sindur veit eg, sigur Stine Bosse og flennur.

- Eg ætli mær út at síggja Føroyar. Har eru tvær útferðir á skránni, men eg havi eisini leigað ein bil, so eg sjálv kann fara ein túr. Tað er so stuttligt loksins at kunna uppliva Føroyar - eg gleði meg nógv, sigur Stine Bosse.



*Tá ið kreppan herjar um allan heim, er tað gott at hava matvørur sum høvuðsvinnu, tí líkamikið hvussu ógvuslig kreppan gerst, so verður altíð eftirspurningur eftir mati, ljóðar tað frá Stine Bosse í sínari stuttu meting av føroyska búskapinum*
*Mynd: Tryg*

### Stine Bosse

Født í 1960, og hevur starvast hjá TrygVesta síðani 1987. Er í dag stjóri í Tryg og samtaksstjóri í TrygVesta - største tryggingarsamtakið í Norðurlondum. Í Danmark starvast 2.200 fólk hjá fyritøkuni.

Størv higartil
- 1999-2001: Stjóri, Tryg
- 1995-1999: Starvsfólkastjóri, Tryg
- 1993-1995: Starvsfólkaleiðari, Tryg
- 1991-1993: Leiðari við ábyrgd fyri vøru- og konceptmenning, skaða- og policedeild, Tryg
- 1990-1991: Leiðari á policedeild, Tryg
- 1988-1990: Leiðari á skaðadeildini, Tryg

Útbúgving
- 2002: LinKS, University of Pennsylvania, USA
- 2001: LinKS, Insead, Frankrig
- 1997: Knowledge Management, ICBI, London
- 1990: Dansk Arbejdsgiverforenings leiðaraútbúgving
- 1987: Cand.jur., Københavns Universitet

Álitisstørv
- Nevndarformaður í fleiri dótturfeløgum hjá Tryg
- Nevndarformaður í F&P - Forsikring & Pension
- Nevndarformaður í Hjertebarnsfonden
- Nevndarlimur í Grundfos Management A/S
- Nevndarlimur í Poul Due Jensens Fond
- Nevndarlimur í Velfærdskommissionen